meg inn á føroyingar. Teir vóru herviligir at koma við stikkpillarum. Føroyingar hava eitt "religiøst forkvaklað forhold" til gudfrøði. Javnan varð eg spurdur um eg var frelstur, og um eg kundi loyva mær eina øl, tá eg nú las gudfrøði. Eg minnist hetta vera ørkymlandi upplivingar fyri meg.

## Opin mafia

Ólavur Rasmussen er eftir øllum at døma ikki liðugur at øsa seg um føroyingar. Presturin fylgir væl við í samfelagsviðurskiftum og politikkur fyllir nógv í hansara lívi.

– Politikkur er drepandi farligur og keðiligur, men hinvegin eisini lívsneyðugur. Talan er jú um okkara gerandisdag, har vit avgera, hvussu virðini verða býtt og hvørji rættindi, vit skulu hava sum borgarar, vísir hann á.

Presturin er brennandi talsmaður fyri, at føroyingar ongantíð ov skjótt gera upp við óskilið innan føroyska vinnulívið, sum hann málber seg.

– Gandaorðini í dag eru liberalur politikkur og privatiseringar, men støðan í føroyska vinnulívinum minnir meira um støðuna í Sovjet undir Polit-bureaunum. Vit eru fullkomiliga í lummunum á nøkrum fáum, sum taka avgerðirnar. Tað eru nakrir heilt fáir vinnulívsmenn, sum sita á valdinum í Føroyum.

Ólavur nevnir skipanina við fiskaloyvunum, sum eitt sera sigandi dømi um hetta óskil. Hann hevur hug at samanbera føroyskar vinnulívsmenn við mafiosar.

– Fiskaloyvini eru besta dømi um, hvussu nakrir fáir sleppa fram at. Onkur hevur skotið baptistarnar fyri at ganga á odda í hesum, men tað eru ikki bara teir. Eg kenni nógvar baptistar, sum ikki fáa ágóðan av almennu fiskaloyvunum. Tað hevur verður sagt, at mafian í Føroyum er tað mótsatta av henni í Italia. Í Føroyum er mafian ikki duld, men sjónlig og øll vita hvørjir hesir menninir eru. Tú hevur tann fyrimun at vera opin mafiosur í Føroyum, tí vit føroyingar av ein ella aðrari orsøk góðtaka hesar spælireglur, heldur hvalbiarprestur.

Hann dugir ikki at taka dagar ímillum, hví føroyingar góðtaka, at nakrir fáir vinnulívsmenn sita á øllum valdinum, sum hann vil vera við.



*– Eg havi ongantíð hildið tað vera strævið at vera prestasonur, og heldur ikki nøkur avmarking. Pápi hevur altíð havt ein frískan hugburð, og eg minnist meg ongantíð verða argaðan at vera prestasonur. Eg gjørdi tað, eg hevði hug til, og eg havi eins og flestu ung gingið í býnum og annað, sum øll onnur ung gjørdu tá, vísir Ólavur Rasmussen á*

*– Stutt fyri eg skuldi taka við prestastarvinum í Hvalba gekk sum rótasúpan, at kirkjan fór at gerast til eitt dansistað. Tá eg arbeiddi í SvF hevði eg nógvar vinmenn frá arbeiðsplássinum og mær dámar væl at fara í dans og fáa mær ein "sving om"*

*– Tað var O.K. Olofson, sum byrjaði hetta nýreligiøsa rákið í fólkakirkjuni. Tú sært serliga hetta rák rundan um Miðflokkin og nýggju prestarnar í dag. Hetta rák er við at drena næstrakærleikan úr kristnidómunum. Eg eri bangin fyri, at teir sokallaðu modernaðu prestarnir við sínum miðaldarsjónarmiðum fara at oyðileggja og knúsa fólkakirkjuna og kristindómin*